# Løgmaður: Hetta er ikki nóg gott

**Løgmaður ásannar, at landsstýrið hevur ikki gjørt nóg mikið fyri at tryggja at skipini hjá Strandferðsluni kunnu sigla, eisini tá ið arbeiðssteðgur er**

ARBEIÐSSTEÐGIR OG STRANDFERÐSLA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landsstýrið hevur ikki gjørt nóg mikið fyri at tryggja, at skipini hjá Strandferðsluni kunnu sigla, hóast arbeiðssteðgur er.

Tað viðurkennir Jóannes Eidesgaard, løgmaður

– Men tað positiva er, at vit hava tikið málið upp og arbeiða fyri at finna eina loysn, leggur hann afturat.

Í morg harrans ár hava politikarar tosað um at gera eina skipan, so vit sleppa undan, at skipini hjá Strandferðsluni í heilum verða løg, tá ið arbeiððsteðgur er.

Tað eru mest Sandoy og serstakliga Suðuroy, sum hava merkt sviðan av arbeiðssteðgum, tí har er alt ferðasamband mangan kvett av til stóram ampa hjá ferðafólki, ítrótti, mentan og serliga hjá vinnulívinum.

Tað eru heili fimm fakfeløg, sum varða av Smyrli og hvørja ferð eitt av teimum er í arbeiðssteðgi, liggur hann. Tey feløgini eru Skipara-og Navigatørfelagið, Starvsmannafelagið, Maskinmeistarafelagið, Havnar Arbeiðsmannafelag, sum eigur mannin, ið bindur Smyril í Havn og Føroya Arbeiðarafelag, ið eigur mannin, ið bindur Smyril í Suðuroy.

Fyri tveimum árum síðani lógu skipini aftur, men tá varð Løgtingið at markinum til at leggja upp í fyri at áleggja pørtunum við lóg at hava strandfaraskipini í sigling.

Men tað kom ikki so langt, tí partarnir funnu saman aftur og funnu eina loysn, áðrenn ein politisk upp í legging kom upp á tal.

Men tá lovaðu fleiri politikarar við plikt og bót, at nú skuldi alt gerast fyri at finna eina skipan, so at skipini ikki aftur fóru at verða løgd av einum arbeiðssteðgi.




*Nú skuldi tað vera- men næstan onki er hent og um ein mánað er vandi fyri, at Strandferðslan aftur verur løgd lamin í arbeiðssteðgi og tað fer at raka sandoyingar og serstakliga suðuroyingar, serstakliga meint*

## Ongan veg komin

Men nú sita Fíggjarmálaráðið aftur við samráðingarborðið og tá er altíð vandi fyri, at tað endar í arbeiðssteðgi.

Men framvegis er ongin skipan funnin, sum tryggjar, at skipini kunnu sigla, skuldi landið aftur enda í verkfalli ella verkbanni.

Vit hava spurt løgmann, hvat varð av ætlanini at finna eina skipan, sum skuldi tryggja siglingina hjá Strandferðsluni í arbeiðssteðgum.

Hann sigur, at málið er tikið upp, men hann ásannar eisini, at tað er alt ov lítið hent á hesum øki.

– Hetta er ikki nóg gott, tí hetta kundi verið munandi meiri intensivt, sigur hann.

Um hetta er eitt nefs til Bárð Nielsen, landsstýrismann, ella ikki, kunnu ymsar meiningar verða um.

Í øllum førum var tað landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sum skuldi standa fyri arbeiðnum.

– Landsstýrið og partarnir á arbeiðsmarknaðinum høvdu ein fund fyrr í summar og har løgdu partarnir síni sjónarmið fram.

– Har førdu vit fram, at tað var sera óheppið, at tað er so ójavnt, sum arbeiðssteðgir raka ymisk øki í landinum.

Løgmaður sigur, at hinvegin er verkfall ein rættur sum fakfeløgini hava og tað hevur sín prís at geva ein rætt frá sær.

Harafturat tosaðu vit um, at tað var neyðugt at viðgera málið.

– Í øðrum londum eru loysnir funnar, so tað eigur eisini at bera til her hjá okkum, sigur løgmaður.

Á tí fundinum varð eisini avtalað, at Bárður Nielsen skuldi kallað partarnar inn aftur sítt í august mánað.

Men nú eru vit í september og ongir partar eru innkallaðir.

Hetta er so tað, sum er hent í málinum hesi seinastu tvey árini, síðani skipini hjá Strandferðsluni seinast lógu í einum arbeiðssteðgi….

## Ongin fundur enn

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at nýggjur fundur við fakfeløgini verður neyvan fyrrenn nýggjur sáttmáli er undirskrivaður.

– Vit samráðast í løtuni við Starvsmannafelagið og at kalla partarnar saman nú at viðgerða spurningin um at Strandferðsluni undan arbeiðssteðgum, kann órógva samráðingarnar, heldur hann.

Hann sigur annars, at á fundinum fyrr í summar, játtaðu fakfeløgini at tey eru sinnað at viðgera spurningin, men tey vilja ikki lova nakað.

## Skammiligt

Fyri tveimum árum síðani, var Gerhard Lognberg, løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin í Sandoy, ein teirra, sum var til reiðar at fáa Løgtingið at samtykkja við lóg, at skipini skuldu sigla, tá ið arbeiðssteðgurin tá var.

Hann fegnaðist um, at samgongan tá settu sær fyri at finna eina varandi skipan, so at Strandferðslan verður undantikin ósemjum á arbeiðsmerknaðinum.

Men hann ásannar, at tað er onmki hent á økinum og tað heldur hann er skammiligt.

– Eg havi reist málið í samgonguni fleiri ferðir, men hvørja ferð eri eg biðin um at taka tað róligt, tí arbett var við málinum.

– Talan kundi ikki vera um at gera nakað við lóg, tí vit skuldu finna eina skipan, sum fakfeløgini kundu góðtaka fyri ikki at taka verkfalsrættin frá teimum.

Hann staðfestir, at orsøkin til so lítið er gjørt, er rætt og slætt tann, at hetta hevur ikki havt nóg stóran áhugað hjá landsstýrinum.

– Var hetta eitt mál, sum landsstýrið brendi fyri, var eisini meiri hent í málinum, so orsøkin kann ikki vera onnur enn manglandi áhugi.

Somuleiðis hevur Johan Dahl úr Sambandsflokkinum, sum eisini er í samgongu, reist málið við jøvnum millumbili, men eisini hann má staðfesta, at onki er gjørt og tað harmast hann um.

Hergeir Nielsen, sum umboðar tjóðveldisflokkin í Suðuroy, er í andstøðu í Løgtinginum, men hann sigur, at hann royndi at fáa undanfarnu samgongu at taka málið upp, men tað varð av ongum.

Somuleiðis hevur hann merkt sær, at hendan samgongan hevur tosað um at gera nakað við málið, men tað er harmiligt, at onki er komið burturúr.

## Dramatiskur Deiggj føðingardagur á Tvøroyri

**Tá Deiggj trummuleikarin gjørdist ov seinur til Smyril leygarkvøldið, mátti tyrla setast inn fyri at bjarga 25 ára føðingardegnum hjá navnframa Suðuroyarbólkinum**

KONSERT

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tá Deiggj leygarkvøldið fór á pall í Tvøroyrar Klubba, at hátíðarhalda 25 ára føðingardagin hjá bólkinum, í staðnum har alt byrjaði fyri 25 árum síðan, var hýrurin munandi betur, enn hann hevði verið nakrar fáar tímar frammanundan.

Umstøðurnar hjá Deiggj, minna ikki sørt um teir trupulleikarnir, ið Summarfestivalurin og G! Festivalurin høvdu í summar.

Í tveir og ein hálvan tíma hildu limirnir í bólkinum, at teir skuldu spæla uttan at vera fullmannaðir. Trummuleikarin Herluf, bassleikarin Sverri og ljómborðsleikarin Pætur skuldu allir koma suður við Smyrli kl. 20 leygarkvøldið, men tá Smyril legði frá landið, vóru einastu deiggjararnir umboð Pætur og Sverri, meðan Herluf stóð á bryggjuni eina lítla løtu ov seinur.

Lagið á Deiggja var ringt hesa løtuna. Bólkurin fekk spælt, tí hann er somikið væl stillaður, at sangarin Dennis er gamli trummuleikarin í bólkinum, men hetta fór at merkja spæliskránna, og teir fingu tí ikki spælt nógv av tí, ið teir ætlaðu at spæla. Fróði Vestergaard viðgongur at lagið var í botni hesa løtuna.

– Hvat hendi, jú ,klokkan 22.35 kemur Tyrlan hjá Altantsflog flúgvandi út úr myrkrinum og út stígur Herluf. Hann hevur leiga sær Tryluna, sigur Fróði.

Hinir sótu tá og fingu okkum ein betri bita heima hjá Dennis, ið inntil hetta hevði eitt kvøld handan trummurnar í væntu.

– Tað lætnaði og humøri vendist 180 gradir, sigur Fróði.

Deiggj spældi síðan alt kvøldið fyri einum klubba, ið var á tremur við fólki.

Teir mundu ikki sloppi av pallinum aftur, tí øll vildu hava eitt eykalag, greiðir Fróði Vestergaard væl nøgdur frá.

Fróði sigur, at hóast tað var dýrt at leiga tyrluna, so var tað allar pengarnar vert.